DEKKMASTER.FO

…tá ið prísurin eisini er avgerandi!

Allar tær **kulu**



Nøgv góð og bílig dekk á goymslu!

DEKKMASTER.FO

www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING

# Fiskivinnuroyndir 2010 Lýsing eftir umsóknum

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleiðni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

**Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:**
- Burðardyggur fiskiskapur
- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Innanfyri høvuðsøkini verður í ár lagdur dentur á at fáa verkætlanir, sum kunnu hava orkusparing við sær.

**Serligur dentur verður lagdur á, at:**
- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging ella onnur fígging er
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- at verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%[1].

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. okt. 2009, kl. 12:00

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2010.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30 / 35 32 48
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Heykavegur 6A
FO-110 Tórshavn

[1]max. 300 kkr./ár í 3 ár

Stuðulstænastan

# Hjálp okkum at finna eitt nýtt navn!

**Løkjukafein skal hava nýtt navn. Tí bjóða vit til navnakapping, har virðisløn verður latin fyri besta uppskotið**

Løkjukafein, ið hevur hildið til í Løkjatúni 1 á Argjum, flytur sítt virksemi niðan í hølini hjá Javna á Hoydalsvegi 40. Løkjukafein er eitt tilboð til fólk við sinnistrupulleikum og er partur av virkseminum hjá Stuðulstænastuni undir Nærverkinum.

**Endamálið við kafeini er millum annað:**
- At bøta um lívsvirðini hjá brúkarunum
- At luttaka í mennandi tiltøkum
- At fremja sosiala samveru millum brúkrarnar
- At fyribyrgja einsemi

Nógv ymiskt virksemi verður í nýggju hølunum, og koma brúkarar og starvsfólk í felag at stinga út í kortið, hvussu virksemið verður skipað.

Stuðulstænastan fevnir um sambýli, bústovnar og virknistilboð til sinnisveikar borgarar og stuðul til heimabúgvandi borgarar yvir 18 ár við serligum tørvi.

Nýggja navnið skal boða frá einum felags samleika, ið eyðkennir virksemið hjá kafeini. Tað skal vera einnevnt, lætt at nýta í ymiskum høpi og ljóða væl. Annars er frítt spæl.

**Virðislønin fyri besta uppskotið er 3.000 kr.**

Nærverkið skilir sær rætt til ikki at nýta nakað av innkomnu uppskotunum. Um fleiri hava skotið upp vinnandi navnið, verður drigið lut um virðislønina.

Øll kunnu luttaka í kappingini, og luttøkan er navnleys. Tað vil siga, at uppskotini ikki skulu vera undirskrivað, men at eitt eyðmerki skal setast á uppskotini. Navn, bústaður og telefonnummar skal viðleggjast í afturlatnum brævbjálva, sum skal hava sama eyðmerki sum uppskotini.

Uppskotini skulu merkjast "Navnakapping" og sendast til:

**Nærverkið**
**Sambýlið við Heyggjar**
Stílað: Sjúrður Johannesen Leiðari
Bóndaheygur 3
100 Tórshavn.

**Seinasta freist at senda uppskot inn:**
1. oktober 2009 kl. 12.00

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru tríggjar deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan og Stuðulstænastan. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# DANSISKEIÐIÐ 09/10

## Fólkadansur í bygdarhúsinum í Hósvík

4. oktober byrja vit aftur at dansa í bygdarhúsinum í Hósvík
Dansað verður hvørt sunnukvøld kl. 19.00 - 21.00

Um nóg nógv tekna seg, verður byrjunarhold, tey dansa frá kl. 18.00 - 20.00

Vand dansa frá kl. 19.00 - 21.00

Kostnaður fyri veturin 09/10 er ***kr. 600,00 pr. par, íroknað limagjald***

Tilmelding sum skjótast á telefon: 214820 ella á fragdin@yahoo.dk



Dansifelagið Fragdin